# Alfred tikið seg úr samgonguni

**Alfred Olsen hevur tikið seg úr samgonguni, sum eina beinleiðis avleiðing av, at uppskotið um grein 266 b varð samtykt, og hevur hann sent fylgjandi skriv út**

POLITIKUR

Eftir at hava umhugsað støðu mína til verandi samgongu, ið eg var við til at skipa, gjølla, havi eg tikið ta avgerð, at eg ikki longur eri at rokna sum partur av sitandi landsstýrissamgongu. Eg vil ikki gera kompromi við mína samvitsku, og havi tí tikið hesa avgerð, sum eina beinleiðis avleiðing av løgtingssamtyktini um broytingar í §266 b í revsilógini.

Sjálvt ríkislógartilmælið varð lagt fram av limum í andstøðuni, men tað vóru atkvøður frá samgonguni sum gjørdu, at broytingin í § 266 b varð samtykt.



*– Eg vil ikki vera við at samtykkja lógir, ið ganga ímóti boðum og ásetingum í tí kristnu siðalæruni, sigur Alfred Olsen*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Eg havi áður sagt frá, at samtykta broytingin í § 266 b, eftir mínum tykki, førir tað føroyska samfelagið inn á eina endaleysa skaðiliga glíðibreyt, og at hetta bert er fyrsta stigið til eina avkristnan av Føroyum.

## Fylgir stevnuskránni

Eg vil ikki vera við at samtykkja lógir, ið ganga ímóti boðum og ásetingum í tí kristnu siðalæruni, men vil virka fyri at verja tað føroyska samfelagið móti allari avkristnan og til hetta arbeiðið havi eg fullan dekning í stevnuskrá floksins, sum í § 1 sigur, at Sambandsflokkurin vil á øllum økjum reka ein framtakshugaðan politikk á kristiligum mentanargrundarlagi.

Sum sambandstingmaður vil eg vera trúgvur móti tí føroyska samfelagnum, sum byggir á tann kristna grundvøllin, og trúgvur móti stevnuskrá floksins.

## Glíðibreytin

Samtyktin at broyta § 266 b kemur at føra tað føroyska samfelagið inn á eina vandakós, har tey næstu stigini verða skrásett paralag, adoptión, eftirgjørdan gitna o.s.fr. Hesum taki eg ikki undir við, og eg vil ikki vera partur av eini samgongu, ið stuðlar hesi skeivu gongd.

Samgongan kundi, um hon vildi, felt uppskotið frá tveimum andstøðutinglimum, um at skoyta orðini “seksuelle orientering” uppí §266 b í revsilógini, tí av teimum 17 tinglimunum, ið samtyktu uppskotið, vóru teir 10 úr samgonguflokkunum.

At taka undir við slíkum uppskotum, er ikki tað, sum flokkurin ið eg umboði, Sambandsflokkurin, hevur staðið fyri, men sjálvur fari eg at halda fast við ta kristnu kós, sum flokkurin hevur havt síðani hann var stovnaður fyri 100 árum síðani.

Eg havi tí tikið avgerð um, sum beinleiðis avleiðing av løgtingssamtyktini um broytingar í §266 b í revsilógini, at eg ikki longur eri at rokna sum ein partur av landsstýrissamgonguni.

**Alfred Olsen**
**løgtingsmaður**

# Heilt ótrúliga langt úti av Alfred

**Løgmaður heldur at avgerðin sum Alfred Olsen hevur tikið, er heilt ótrúliga langt úti. Hann sigur at Alfred sendur rokningina skeivan veg, og um hann skal revsa nakran, so átti hann heldur at revsa sínar egnu partamenn**

POLITIKUR

*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Jóannes Eidesgaard, løgmaður, heldur lítið um avgerðina, sum Alfred Olsen hevur tikið, um at taka seg úr samgonguni.

– Eg haldi tað er heilt ótrúliga langt úti, at hann ger tað til eitt samgongumál. Við hesum kastar hann onkursvegna ábyrgdina á samgonguna og spurningurin er, um tað er rætt av honum, sigur løgmaður. Hann vísir á, at í samgonguni vóru tíggju atkvøður fyri uppskotinum. Fimm frá Sambandsflokkinum, fýra frá Javnaðarflokkinum og einari frá Fólkaflokkinum.

– Hetta hevur ongantíð verið eitt samgongumál, og Alfred gloymir, at fimm atkvøddu fyri uppskotinum í Sambandsflokkinum. Eg haldi ikki, at hann sendir rokningina til rætta viðkomandi.

– Skal Alfred revsa nakran, so átti hann heldur at revsa sínar egnu, heldur løgmaður fyri.

– Men rímilig vís, hann skal jú eisini yvirliva næsta val eisini, sigur løgmaður, Jóannes Eidesgaard.

Nógv hevur verið tosað um samgongustev og breiðu semjuna, og spurningurin er nú, um hetta hevur oyðilagt stevið?

– Tað gagnar so ikki stevinum, men vit mugu royna at halda út og seta fokus á onnur mál, sum hóast alt eru, tí tað er ikki bara 266 b til, heldur Jóannes Eidesgaard, løgmaður.



*– Skal Alfred revsa nakran, so átti hann heldur at revsa sínar egnu, heldur løgmaður fyri*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin